RÁÐGEVARAFELAGIÐ

Heystið / veturin 2020

# FØROYSK RÁÐGEVING

Arkitektar | Verkfrøðingar | Byggifrøðingar



Tak støðu til virðini í bygdini

Fleiri nýggir skúlar

Hugsa ljóðið inn beinanvegin

**Útgevari**
Ráðgevarafelagið
Óðinshædd 7
FO-100 Tórshavn
industry@industry.fo

**Skrivað**
Óluva Zachariasen
oluvazac@gmail.com

**Layout**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

**Prent**
Føroyaprent

**Kápumynd**
Skúlin á Fløtum,
Leit / Finnur Justinussen

**Upplag**
1.000 eintøk

## Føroysk ráðgeving

Ráðgevarafelagið, sum er felagið hjá arkitektafyritøkum, verkfrøðingafyritøkum og byggifrøðifyritøkum í Føroyum, hevur latið gera hetta blaðið. Endamálið hjá felagnum er at savna ráðgevandi fyritøkur við heimstaði í Føroyum, serliga í byggivinnuni, at útinna felags áhugamál.

Felagið varð stovnað í 2008 og heldur til í Vinnuhúsinum.

Føroysk ráðgevaravinna er nógv ment seinastu áratíggjuni, og avrikini hjá føroyskum ráðgevarum eru mong og fjølbroytt, eins og sæst í blaðnum. Áhaldandi minnir Ráðgevarafelagið á, at føroyskir ráðgevarar skulu hava líka góðar møguleikar at bjóða upp á verkætlanir sum útlendskar fyritøkur.








**4** Mugu útbyggja við umhugsni

**8** Tak støðu til virðini í bygdini

**16** Lat fleiri húski byggja saman

**20** Arkitekturur skapar stórt meirvirði



**25** Fleiri nýggir skúlar

**30** Hugsa ljóðið inn beinanvegin

**34** Arbeiddu mest fyri privatu vinnuna









# Mugu útbyggja við umhugsni

Vit eiga at hugsa okkum væl um, hvussu vit útbyggja okkara býir og bygdir, soleiðis at tær bæði uttandura og innandura vera fólkavinarligar, vakrar, funktionellar, umhvørvisvinarligar og rótfestar í okkara uppruna, sigur Klæmint Eliasen, formaður í Ráðgevarafelagnum.



> “LAND OKKARA ER LÍTIÐ, OG VIT EIGA TÍ AT BRÚKA ØLL ØKIR VÆL OG VIÐ STÓRUM UMHUGSNI FYRI HEILDINI

Tað verður nógv bygt í Føroyum í hesum døgum. Í hesum blað kanst tú lesa um nakrar spennandi skúlabyggingar, sum verða lidnar nú, og sum Ráðgevarafelagið fegnast um.

Í skúlum, eins og í mongum øðrum sløgum av bygningum og arbeiðsplássum, er vaksandi tilvitska millum fólk um týdningin av akustiska umhvørvinum. Í blaðnum er áhugaverd samrøða við Jóhannes Steingrund um arbeiðið, tey gera á hesum øki, og har víst verður á stóra týdningin av at taka akustisku krøvini tíðliga við í planleggingina av bygningum.

## Førleikarnir eru her

Í blaðnum er sjóneykan eisini sett á býar- og bygdaplanlegging.

– Hetta er eitt mál, sum kommunur hava arbeitt við í mong ár, men sum Ráðgevarafelagið heldur, at kommunurnar eiga at





leggja seg enn meira eftir, sigur Klæmint Eliasen, formaður í Ráðgevarafelagnum.

Land okkara er lítið, og vit eiga tí at brúka øll økir væl og við stórum umhugsni fyri heildini.

- Vit eiga at hugsa okkum væl um, hvussu vit útbyggja okkara býir og bygdir, soleiðis at tær bæði uttandura og innandura vera fólkavinarligar, vakrar, funktionellar, umhvørvisvinarligar og rótfestar í okkara uppruna. Tað tørvar ikki at fara av landinum at leita eftir førleikum til at arbeiða víðari við hesum máli, tí hetta er nakað, sum fleiri ráðgevarafyritøkur í Føroyum hava góðar førleikar til og brenna fyri, sigur Klæmint Eliasen.

## Høvdið kalt undir korona

Koronafarsóttin hevur ávirkað samfelagið nógv seinastu mánaðirnar, men samskiftistøkni og proaktivum starvsfólki fyri at takka hevur tað eydnast teimum flestu ráðgevarafyritøkunum at avmarka árinini av stongslinum við at arbeiða heimanífrá.

Somuleiðis hevur tað eydnast byggiharrum og arbeiðstakarum at halda byggiplássini koyrandi stórt sæð alla tíðina heldur enn at steingja hesi, eins og er hent aðrastaðni úti í heimi. Nakað sum hevði havt sera negativar avleiðingar fyri hesi byggiarbeiði.

– Tá koronafarsóttin byrjaði, heitti Ráðgevarafelagið á myndugleikarnar um at halda høvdið kalt og ikki stíga á bremsu-



na, so verandi arbeiðir steðga upp, og verkætlanir í framtíðini verða útsettar. Og hetta er framvegis boðskapurin hjá Ráðgevarafelagnum, sigur Klæmint Eliasen.

## Slakka av

Sum sæst í grein um hagtøl seinast í blaðnum, hevur ráðgevaravinnan havt stóran vøkstur seinastu árini og eisini í fjør.

– Men verður hugt nærri eftir verkætlanum, sum nú liggja fyri framman, so tykist tað sum virksemið í byggivinnuni fer at minka. Hetta fer helst at ávirka ráðgevarafyritøkurnar fyrst og nakað seinni eisini arbeiðstakararnar, sigur formaðurin í Ráðgevarafelagnum.

Byggivinnan úti í heimi og eisini í Føroyum hevur altíð sveiggjað millum góðar og minni góðar tíðir – og hetta, sum stendur fyri framman, fara vit eisini at leggja aftur um okkum.

– Tað nýtist ikki at gerast eitt stórt sveiggj, um annars rætt verður atborið. At byggivinnan slakkar eitt sindur av aftur eina tíð, kann eisini gerast eitt høvi til at taka verkætlanir fram aftur á borðið, sum kanska hava verið lagdar til viks vegna nógvu ferðina, sum hevur verið í byggivinnuni seinastu árini, sigur Klæmint Eliasen, formaður í Ráðgevarafelagnum.





# TAK STØÐU TIL VIRÐINI Í BYGDINI

**Allar kommunur eiga at taka støðu til, hvørji støð hava serligt virði og skulu varðveitast. Og vit mugu hugsa fleiri ættarlið fram, tá vit byggja, siga arkitektarnir, Rúni Abrahamsen og Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen.**

Tað skal vera pláss fyri fuglunum, sum reiðraðust her, áðrenn vit vóru til. Teir skulu eisini vera her, tá vit eru farin. Tí fær vátlendið frið á plansjunum hjá MAP Arkitektum í hugskotskappingini um at gera heildarætlan fyri Stórutjørn.

Stóratjørn skal vera til øll ættarlið, og íbúgvarnir skulu kunna hittast í nærumhvørvinum. Tí standa borgarahús, matvørutorg, sambýli, súkklugøta, dagstovnur og skoytuhøll eisini á plansjunum.

Tveir vinnarar vóru í hugskotskappingini um Stórutjørn. Arkitektafyritøkurnar MAP og SNA við sínum toymum fingu báðar fyrstu virðisløn fyri uppskotini.

## Hugsa breitt og langt

Um ætlanirnar verða veruleiki, fer tíðin at vísa. Í øllum førum fegnast arkitektarnir, Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen og Rúni Abrahamsen um, at ein kommuna hugsar í heildum. Arkitektahjørtuni banka fyri býarplanlegging.

Tey sakna góða býarplanlegging í Føroyum. Har kommunur planleggja burðardygt og hyggja bæði aftureftir og frameftir. Har landið ger yvirskipaðar raðfestingar. Og har bygging tekur størri atlit til menniskju.

– Horisonturin er ikki nóg víður, tá fólk planleggja. Ella byggja. Tí ofta verður bygt uttan at planleggja. Kappingin um Stórutjørn er umráðandi og spennandi, tí hon tekur upp nógv týdningarmikil viðurskifti. Hendan holistiska planleggingin – at mann hugsar allan vegin runt og ikki bara um ein einstakan bygning, sigur Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen.



Lógin um býarskipanir og byggisamtyktir frá 1954 áleggur øllum kommunum at gera byggisamtykt fyri hvørja einstaka bygd í kommununi, har tað verður ásett, hvar vegir, hús, vinnuøki o.a. skulu vera. Kommunurnar gera sínar byggisamtyktir, men lógin er gjørd til eina heilt aðra tíð, sigur Rúni Abrahamsen.

## Skráseting manglar

– Í nógvum kommunum er ongin skráseting av gomlu bygningunum, og hvat hevur siðsøguligt virði. Teir bygningarnir eru dna'ið í bygdini. Um tú ikki skrásetur tað og ger tær tankar um, hvat av hesum hevur týdning fyri okkum sum bygd, er vandi fyri, at tað verður forkomið, sigur Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen.

– Ov nógvir bygningar eru tiknir niður í Føroyum, sum hava havt týdning fyri okkara søgu og samleika. Onkur sigur, at bygningarnir standa og forða fyri framburði. Sovorðið tvætl. At skræða niður er lættasta loysnin. Ofta er tað tí, at ongin hevur sett seg niður at hugsa, um tað var ein annar møguleiki, sigur Rúni Abrahamsen.

Alt skal tó ikki varðveitast, sigur hann. Sumt er vánaligt og skal bara takast niður. Men kommunurnar mugu aktivt taka støðu til, hvat hevur týdning og má varðveitast.

## Tað søguliga gevur frið

Varðveiting frá fleiri tíðarskeiðum ger staðið áhugavert og upplivingarríkt.



–Tað gevur frið í kroppinum at føla, at her er ein søgulig tyngd. Far til Róm ella París. Hvat søkir tú? Tað gamla! Tað hevur nakað við proportiónir at gera. Nakað sum er skapt til menniskju og hevur eina stoffligheit, sum er áhugaverd, sigur Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen.

Hetta merkir ikki, at alt tað nýggja er vánaligt. Tú skalt leggja aftrat og gera tað á ein góðan hátt.

## Komandi ættarlið

Góð býarplanlegging snýr seg eisini um komandi ættarlið.

– Ein býur hevur nógv longri livitíð enn bara okkara lív. Fysiska avtrykkið – bygningar, anlegg, ja alt sum vit byggja – stendur eftir okkum langt eftir at vit eru farin foldum frá. Tað liggur nógv størri ábyrgd í tí, tú gert, enn bara ein skjót loysn, t.d. við gróti sum bara skal fyllast í onkrastaðni ella endaleysar sethúsaútstykkingar uttan menniskjansligt innihald, sigur Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen.

Býarplanlegging eigur ikki einans at liggja í kommunala geiranum. Landið má eisini hava nakrar yvirskipaðar tankar um, hvussu lendið í Føroyum skal brúkast, og hvørji náttúruøki ikki mugu órógvast. Margfeldislógin, sum undanfarna landsstýri royndi at fáa ígjøgnum, var eitt gott átak, sum









vónandi verður veruleiki, spyrt tú arkitektarnar.

*Men tekur tað ikki ov langa tíð at fáa bygt nakað, um arkitektar skulu sita við borðendan og altíð hugsa 500 ár fram?*

– Tað snýr seg um at vera upp á forkant. Sjálvandi skulu vit hava stórar bygningar, tí vit fara altíð at hava stórar framleiðslur. Vit skulu bara duga betri at leggja til rættis, hvar teir skulu vera, sigur Rúni Abrahamsen og nevnir Gundadali í Havn sum dømi um víðskygda planlegging við stórum bygningum og økjum til ítróttin.

## Bústaðir og djóralív

Góð býarplanlegging tekur atlit til náttúruna.

Tey fegnast um, at Tórshavnar kommuna lat gera árinskanning av Stórutjørn, har serfrøðingar kannaðu djóralív, plantur o.a. Hetta er fyrstu ferð, at tey hava upplivað, at ein árinskanning fylgir við einari ætlan.

Vit mugu ansa eftir fuglum, vátøkjum, vistskipanum og øðrum náttúruviðurskiftum. Tí eru í Stórutjørn rættiliga stór øki, har MAP Arkitektar ongan bygning hava teknað, og har náttúran fær frið.

Tað er freistandi at trýsta nógvar bústaðir inn á økið. Men bústaðartrot er eitt samansett hugtak.

– Í fleiri bygdum standa hús tóm. Summi eiga fleiri hús, meðan onnur ongi eiga. Í fleiri sethúsum

búgva 1-2 fólk, meðan stórar familjur eru stúgvaðar saman í ov smáum íbúðum. Í bygdum og býum gera tey alsamt fleiri útstykkingar uttan fyri bøgarðarnar, meðan fleiri teigar eru óbygdir innan fyri bøgarðarnar, sigur Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen.

Eftir hennara tykki er tað meiri burðardygt at útbyggja miðstaðarøkir í bygdunum við bústøðum og hølum til lættari vinnu, t.d. hárfríðkan, handil, kafé og skrivstovur. Tað ger bygdina ella býin áhugaverdari - serliga hjá eldri og ungum, sum hava brúk fyri at vera sosial. Hetta leysgevur eina rúgvu av sethúsum við góðum urtagørðum til barnafamiljur. Fært tú umskipað bústaðirnar, so teir passa til tørvin hjá fólki, er bústaðarneyðbarometrið neyvan so lágt.



## Trivnaður og integratión

Góð býarplanlegging skapar trivnað.

Arkitektarnir vísa á, at tá vit útstykkja til sethús í Føroyum, hava vit vanliga matriklar eftir einari linju, ein veg ímillum og so aftur matriklar. Kanska eitt parkeringsøki til fleiri bilar, og onkrastaðni eitt hissini spælipláss. Onki stað, har grannarnir kunnu hittast. Vit planleggja ov nógv eftir bilinum og ov lítið eftir menniskjum.

Fólk hava ein grundleggjandi tørv á sosialari interaktión. Vit skulu skapa almenn rúm, har tað er lætt at hittast uttan avtalu ella ørindi. Býarrúm sum savna fólk og minka um einsemi, siga MAP-arkitektarnir.

Hesi rúmini kunnu t.d. hava stóran týdning fyri integratiónina, tá útlendingar flyta til Føroya. Ella tá fólk flyta til økið við Skálafjørðin, nú tunnilin letur upp. Góð býarrúm gera tað lættari at skapa sosial sambond, og tey skulu hugsast inn í bæði býlingar og miðøki.

Trappan í Vágsbotni í Havn er eftir teirra tykki dømi um eitt gott býarrúm. Hon er vøkur, úr góðum tilfari, og tú kanst altíð seta teg at fylgja við í býarlívinum.

-Vit eiga at hugsa meira, hvussu vit gera úti-innrættingar, so fólk kunnu sita saman og hugna sær, hóast veðrið er ringt. Og undir korona er tað jú ein tørvur. Skalt tú



síggja fólk, má tað vera úti, sigur Rúni Abrahamsen.

## Ráð til nýggjar býráðslimir

Í november er kommunuval. Tey valdu fáa stóra ávirkan á fysiska landslagið úti í kommununum næstu fýra árini. Hvørji ráð hava Rúni Abrahamsen og Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen til teirra?

Tað er at planleggja meira langsiktað, taka støðu til virðini í kommununi og at brúka fakfólk, sum hava skil fyri býarplanlegging, serliga arkitektar og landslagsarkitektar.

Tað besta var, um hvør kommuna orðaði ein arkitekturpolitikk sum sigur, hvat er serligt við býnum ella bygdini, og hvussu økið skal mennast frameftir. Hvat skal varðveitast? Hvat hevur týdning fyri íbúgvarnar? Tað kann vera fjøran. Ella lendið, plantur, fuglalív, anlegg og bygningar við siðsøguligum virði o.s.fr. Tú mást fyrst eyðmerkja virðini í orðum – helst í tøttum samstarvi við borgararnar – og síðan leggja eina fysiska ætlan, sum so verður leiðvísari til allar útbyggingar í økinum.

Men minni kann eisini gera tað, staðfestir Rúni Abrahamsen. Eftir hansara tykki ger tað stóran mun, bara kommunur gera heildarætlanir fyri nøkur øki.

# Lat fleiri húski byggja saman

**Við býlingum og byggifelagsskapum kunnu við skapa eitt meira fjøltáttað byggimynstur, sum er burðardygt umhvørvisliga, fíggjarliga og sosialt. Og sum hevur tørvin hjá tí einstaka í huga, sigur Selmar Nielsen, arkitektur.**

Bústaðamarknaðirnir í Havn og nógvum av stóru býunum í Norðurlondum eru undir trýsti. Trot er m.a. á smærri bústøðum, sum hóska til samansetingina á staðnum. Einsemi millum ung og eldri er vaksandi. Fleiri eldri fólk sóknast eftir eldrabú-felagsskapum, og samstundis eru tey ungu og barnafamiljurnar meira tilvitað um burðardygd.

– Alt hetta setur nýggj krøv til, hvussu vit fyriskipa okkara býir í framtíðini. Rákini um burðardygd og at fólk eftirlýsa felagsskapir fer at broyta okkara byggi- og bústaðamynstur, sigur Selmar Nielsen, arkitektur og stjóri í arkitektafyritøkuni, SNA.

SNA vann fyrr í ár 1. virðisløn í hugskotskappingini um eina heildarætlan fyri Stórutjørn. Hina 1. virðislønina vann MAP Arkitektar.

## Hugsa býlingar av nýggjum

Teirra uppskot leggur stóran dent á siðbundnu býlingarnar í Føroyum, sum verða hugsaðir í einum nýggjum, modernaðum hami. Í uppskotinum leggja tey eisini upp fyri møguleikanum, at fólk kunnu seta føtur undir egið borð í einum byggifelagsskapi.

Vanliga verða nýggj býarøki boðin út sum stórar byggigrundir við 20-100 bústaðaeindum, antin sum stakar byggigrundir ella har ein privat fyritøka byggir allar bústaðareindirnar við vinningi fyri eyga. Hjá nógvum borgarum eru sethús ov dýr at byggja, og stóru íbúðaverkætlanirnar, ið skulu tjena pengar, eru ikki altíð klárar at lofta nýggjum ynskjum um bústaðasløg, snið, burðardygd o.a.

Her eiga krøv at verða sett, soleiðis at samansetingin av bústøðum í størri mun hóskar til fólkasamansetingina, sigur stjórin í SNA.



> VIT SKULU DUGA BETUR AT LOFTA NÝGGJU RÁKUNUM OG YNSKJUNUM TIL BÚSTAÐABYGGING. OG TAÐ KUNNU VIT GERA VIÐ BYGGIFELAGSSKAPUM

## Fleiri húski saman

– Vit skulu duga betur at lofta nýggju rákunum og ynskjunum til bústaðabygging. Og tað kunnu vit gera við byggifelagsskapum, heldur Selmar Nielsen.

Byggifelagsskapir (Baugruppen) eru eitt kent fyribrigdi Í Týsklandi og hava við tíðini eisini vunnið nakað fram í Danmark. Ein byggifelagsskapur er ein bólkur av einstaklingum (ofta 5-20 fólk/húski), sum ganga saman í felagsskap fyri at menna og byggja sínar bústaðir.

Talan kann t.d. vera um tíggju ungar barnafamiljur, sum saman menna ein búfelagsskap við denti á býtisbúskap, ella barnafamiljur og eldri fólk, sum saman menna ein búfelagsskap tvørtur um ættarlið.

## Felagsskapur og framtakshugur

Ein byggifelagsskapur kann vera bíligari fyri tann einstaka, um fleiri eru saman um at bera kostnaðin av felags hølum og funktiónum. Eisini kann hann hava positivt árin á nærumhvørvið, tí hetta slagið av bygging leggur dent á felagsskapin.

Í byggifelagsskapum eru ofta virkishugaðir og framtakssinnaðir íbúgvar. Byggifelagsskapirnir eru vanliga meira sinnaðir at royna ymiskar loysnir viðvíkjandi arkitekturi, burðardyggum tiltøkum, nýggjum tilfari o.ø.

Eisini eru byggifelagsskapir ofta sosialt tilvitaðir. Dømi eru um, at felagsskapirnir hava ment smáar og bíligar bústaðir aftur at sínum egnu bústøðum at leiga út til ómúgvandi eldri ella viðkvom ung, sum so verða boðin við upp í felagsskapin.

Byggifelagsskapir eru ikki bara til fyrimunar fyri íbúgvarnar. Teir kunnu eisini betra um býardygdina í nýggjum býarpørtum, tryggja sosialt fjølbroytni og draga virkishugaðar borgarar at sær. Tí er tað ein fyrimunur at hava teir við í strategisku planleggingini av eini býarmenningarverkætlan, tí teir kunnu skapa fjølbroytni bæði sosialt og





arkitektoniskt umframt at tryggja nýggjar hentleikar og funktiónir í býarpartinum og í býlingunum, sigur Selmar Nielsen.

## Mennast víðari

Í býlingunum, sum arkitektarnir hjá SNA hava teknað við Stórutjørn, hava tey sett øki av til byggifelagsskapir. Hetta skal sjálvandi mennast víðari í tøttum samstarvi við kommununa, sigur Selmar Nielsen.

-Leggja kommunurnar matrikkulstøddir og útboðshátt til rættis, ber til at skapa eitt heilt nýtt slag av bústaða- og býarmenning í Føroyum, sum lýkur tørvin hjá nøkrum nýggjum íbúgvabólkum og kann skapa nýggj bústaðamynstur og nýskapandi og burðardygga bygging, sigur Selmar Nielsen.

Hann dugir ikki at síggja nakra forðing fyri byggifelagsskapum í Føroyum. Ofta er tað meira vanahugsanin, at vit plaga at byggja á ein ávísan hátt, sum setur mørk, heldur hann.





> “VIÐ AT HUGSA ÚT UM BOKSINA BER TIL AT FÁA SPENNANDI LOYSNIR, SUM RØKKA ÚT UM UPPRUNALIGA MÁLBÓLKIN

# ARKITEKTURUR SKAPAR STÓRT MEIRVIRÐI

**Bygging hevur í sera stóran mun snúð seg um byggitíð og kostnað. Tað er tiltrongt at vísa, hvussu stórt meirvirði góður arkitekturur í veruleikanum skapar, sigur stjórin í EYA, Eyðun Eliasen.**

Ein skúli er eitt stað at undirvísa børnum og ungum... og nógv annað.
Ein konsertbygningur er til tónleik... men ikki bara.
Ein brúgv leiðir bilar og fólk yvir um eina á... og kann eisini vera annað.
Eini býráðshús eru skrivstova og fundarhøli... umframt ymiskt annað.
Hjá nógvum er virðið í einum bygningi oftast mett eftir primeru funktiónini og byggikostnaðinum. Fleiri hugsa ikki um, at væl úr hondum greiddir bygningar ofta hava nógv breiðari funktión, brúkaraflatu og nýtslumøguleikar enn tað, teir fyrst og fremst vóru ætlaðir til. Til dømis spara orku, minka talið á sjúkradøgum, eggja ungfólki at útbúgva seg, draga ferðafólk til landið o.s.fr.

## Danskir arkitektar

Danske Arkitektvirksomheder setti sær fyri at seta ljóskastaran á meirvirðið í arkitekturinum. Felagið hevur gjørt eina vegleiðing til, hvussu arkitektar kunnu optimera og skjalfesta sosialu, umhvørvisligu og fíggjarligu virðini, sum arkitekturur skapar. Vegleiðingin er í frágreiðingini "ARKITEKT – Dokumentér din værdiskabelse". Á heimasíðuni www.danskeark.dk

hava tey savnað fleiri dømi um, hvussu arkitekturur skapar virðir og vinning fyri byggiharra, brúkara og samfelag. Felagið hevur eisini verið Føroyum og kunnað um átakið.

## Tiltrongd áminning

Hetta er eitt mótrák til gongdina seinastu árini, har bygging í ov stóran mun hevur snúð seg um byggitíð og kostnað, sigur Eyðun Eliasen, arkitektur og stjóri í arkitektafyritøkuni, EYA.

Tað er tiltrongt at fáa eina áminning á virðini, sum arkitekturin skapar. Tey eru ikki fremmand.

– Undir útbúgvingini til arkitekt verður tú uppvandur við, at alt, sum tú arbeiðir við, skal liva upp til idealini um, at tað skal vera burðardygt umhvørvisliga, estetiskt, sosialt og fíggjarliga. Harumframt verður støðugt gjørt vart við varandi virðini í arkitekturinum, sigur Eyðun Eliasen.

Fleiri av stóru, donsku arkitektafyritøkunum eru farnar at skjalfesta virðini í arkitekturinum á ymsan hátt. Stjórin í EYA ásannar, at flestu arkitektafyritøkur í Føroyum eru rættiliga smáar, og tí er kanska avmarkað orka til at skjalfesta og kunna um síni avrik úteftir.

## Smáar umsitingar

Ov nógv verður hugsað um at spara pengar í byggiverkætlanum, heldur Eyðun Eliasen. Sjálvandi eru pengarnir ikki óavmarkaðir, men kommunur, land og byggiharrar kunnu hava lyndi til at gloyma alt tað, tey kunnu fáa fyri pengarnar, um tey lova arkitektum og teirra samstarvsfelagum at levera sítt besta.

Í Føroyum duga vit ofta ikki nóg væl at síggja virðir og møguleikar í arkitekturi, heldur Eyðun Eliasen.

– Umsitingarnar í flestu kommununum eru smáar, og bert onkur einstøk kommuna hevur arkitekt. Ein arkitektur kann vísa borgarstjóranum og hinum politikarunum á góðu loysnirnar, sigur Eyðun Eliasen.

Ein onnur avbjóðing er, at íløgujáttanirnar generelt eru ov smáar til byggiverkætlanir, og at játtanarskipanirnar eru rættiliga stirvnar. Tað kann vera ógvuliga trupult at útvega eyka pengar til eina góða loysn, sum kostar eitt sindur meira, vísir Eyðun Eliasen á.

## Sparingar minka langtíðarvirðið

Játtanarmodellini til bygging eru ofta sera stuttskygd, sigur felagið hjá donsku arkitektunum og minnir á, at bygningar og konstruktiónir skulu vara fleiri ættarlið.

Alt ov ofta hava sparingar og trongar fíggjarætlanir við sær, at langtíðarvirðið á bygninginum minkar.

Væl gjørdir og gjøgnumhugsaðir bygningar kunnu geva týðandi fyrimunir langt fram í tíðina, sum kunnu roknast um til pengar. Til dømis at betri inniluft kann geva minni sjúkrafráveru, betri tilfar gevur orkusparing, og áhugaverdur



arkitekturur kann geva positiva miðlaumrøðu og fleiri vitjandi. Fyrimunir sum geva stóran vinning, um tú roknar breitt og langt fram.

## Úr boksini og upp á takið

Vit skulu hava fleiri multifunktionellar loysnir, tí ofta hugsa vit ov eindimensionelt, tá vit byggja, heldur Eyðun Eliasen. Tað er helst lættari hjá politikarum at hugsa um eitt ting í senn. 2-3 ymisk sløg av brúkarum er komplekst, men tá er tað uppgávan hjá arkitektinum at gera fyrimunirnar sjónligar. Við at hugsa út um boksina ber til at fáa spennandi loysnir, sum røkka út um upprunaliga málbólkin, sigur Eyðun Eliasen og nevnir brennistøðina á Amager við skíðbrekkuni á takinum sum eitt spennandi dømi um arkitektur við meirvirði. Eisini konsertbygningurin Harpa í Reykjavík og Operahúsið í Oslo eru áhugaverd, tí tey geva meirvirði við at draga nógv ferðafólk til sín og til býirnar.

Góð dømi herheima eru býráðshúsini í Eysturkommunu, har fólk kunnu spáka uppi á takinum at njóta útsýnið, og takið á Skúlanum á Fløtum við gøtu og terrassu. Takið er ein upplagdur og spenn-



andi møguleiki, sum sjálvandi má sniðgevast til føroyska veðurlagið. Vit eiga eisini at duga betur at útnytta plássið millum bygningar og skapa tey til áhugaverd støð at vera, heldur Eyðun Eliasen.

## Í tí smáa

Eisini í smáum verkætlanum verður arbeitt við at skapa meirvirði. Í allarflestu sethúsaverkætlanum, sum EYA ger, verður t.d. roynt at gagnnýta takið á bilhúsi ella bilskýli sum rúmliga altan út frá tilhaldsrúmum.

Annað dømi er lítla verkætlanin við vindskýlinum í Neshaga, sum umframt at vera skýli við bonki í góðari lívd eisini er ein installatión, har serligt ljóð ljómar úr rørunum, tá fRískt lot er.

Eyðun Eliasen sigur, at góð ráð-geving í eini byggitilgongd eigur at vera ein samanrenning av nógvum ynskjum og krøvum til eina byggi-verkætlan og kreativt arbeiði, sum sæst aftur í tí, sum bygt verður.

# FLEIRI NÝGGIR SKÚLAR

**Undirvísingin í føroysku fólkaskúlunum hevur fingið munandi betri karmar at virka undir. Í hesum árinum hava fleiri nýggir og nýútbygdir skúlar latið dyrnar upp. Føroyskar fyritøkur hava staðið fyri ráðgevingini.**

Fyrr í ár varð Skúlin á Skúlatrøð í Klaksvík tikin í nýtslu. Í oktober kom so túrurin til Skúlan á Fløtum í Havn og Skúlan við Streymin, sum er staðsettur á Oyrarbakka. Um ársskiftið eiga fuglfirðingar tørn, tí tá letur nýggi skúlin í Fuglafirði upp.

Nýggju skúlabygningarnir eru spennandi og kveikjandi karmar rundan um undirvísingina í fólkaskúlanum og verða samstundis savnandi miðdeplar í mentunarlívinum á staðnum.

Vit fara her at hyggja nærri at skúlunum:







# SKÚLATRØÐ Í KLAKSVÍK




**Høvuðs- og arkitektaráðgevi:** Fuglark | **Berandi verkfrøði:** Sámal Johannesen
**HVS- og el-verkfrøði:** SMJ | **Akustikkur:** Steingrund Akustik | **Byggileiðsla:** Ráð

Skúlatrøð er bæði nýbygging og samanbygging av skúlunum við Ósánna og á Ziskatrøð.

Verkætlanin er í trimum byggistigum. Fyrsta byggistigið, sum nú er liðugt, samanbindur verandi bygningar við einum torgi/felagshøll. Her eru m.a. 22 nýggjar skúlastovur, tónleikahøli, skúlakøkur, bókasavn og høvuðsinngongdir.

Torgið/felagshøllin er natúrliga kjarnan í skúlanum. Her er matarstaður við yvir 250 borðplássum umframt eitt amfi-skapað framførslustað. Felagshøllin rúmar umleið 750 fólkum.

Bókasavnið er í tveimum. Annar parturin er sjálvstøðugt afturlatið høli, ið er umsitið av bókavørðinum. Hin parturin er í opnum umhvørvi við felagshøllina, sum næmingar altíð kunnu brúka.

Allur skúlin er sniðgivin í samráð við akustikara. Hetta sæst aftur í t.d. tilfarinum inni og á "skeivu" glasútveggjunum við amfitrappuna á torginum.

Í tónleikastovuni ber til at broyta eftirklangstíðina alt eftir slagi av tónleiki. Veggurin út til torgið kann flytast, so tónleikastovan gerst pallur fyri amfi-økið.

Skúlakøkurin er skipaður soleiðis, at borðreiðast kann út í felagshøllina.

Hvør flokkur hevur sína heimastovu. Glasfasadan frá gólvi til loft tryggjar gott dagsljós. Onkur av flokshølunum kunnu leggjast saman til størri rúm. Í felagsøkjunum eru sofur og borð, har næmingar kunnu hugna sær, gera bólkaarbeiði o.a.

Skúlin er sniðgivin í samsvari við nútíðar byggitøkni og byggilist, samstundis sum hann hóskar til verandi bygningar á staðnum. Bygningsskapið og tilfarsvalið er einfalt við greiðum konstruktiónum. Skúlin á Skúlatrøð verður hitaður við sjóhita.

# SKÚLIN VIÐ STREYMIN




**Arkitektaráðgeving:** Brim Arkitektar | **Konstruktiónir, anlegg og el:** LBF | **HVS og ventilatión:** PB Consult | **Akustikkur:** Steingrund Akustik | **Brunaráðgeving:** SMJ | **Byggileiðsla:** Brim Arkitektar







Tá Sunda kommuna avgjørdi at savna allar næmingar í skúlanum á Oyrarbakka, varð neyðugt at útbyggja Felagsskúlan. Tørvur var á skúlastovum, størri felagsøkjum og nýggjum lærarahølum. Haraftrat vildi kommunan hava ítróttarhøll.

Útbyggingin og ítróttarhøllin eru bygd niðan fyri gamla skúlan. Tey eru drigin langt oman móti høvuðsvegnum og so langt niður í lendið sum møguligt. Skúlin er sjónligur og á tann hátt samleikaskapandi. Og hann er høgligur at koma til.

Skúlaparturin er í tveimum hæddum. Í ovaru hæddini eru skúlastovur, skúlabókasavn og fólkabókasavn. Í niðaru eru lærarahøli, køkur og matarsalur.

Í hesum partinum er stóra felagsrúmið, sum við eini stórari amfitrappu knýtir saman funktiónirnar í skúlanum. Hiðani er samband niður í ítróttarhøllina, sum liggur eina hædd longur niðri. Saman við ítróttarhøllini, bókasøvnum og stórøkinum skal hetta rúmið kunna hýsa alskyns tiltøkum.

Skúlabygningurin er bygdur við betongsúlum, betongdekkum og -tekju og stáldragarum.

Fasadurnar í ovaru hæddini eru lættir veggir klæddir við Steni-plátum. Fasadan í niðaru hæddini er úr glasi og aluminiumplátum.

Ítróttarhøllin er bygd við betongsúlum og -veggjum. Sperrur eru gittarbjálkar úr stáli. Útveggirnir eru klæddir við Steniplátum, sum eru lagdar á klink. Tær hava ymiskan glans, sum gevur eitt mynstur, tá ljósið skyggir á fasaduna.

Hitakeldan er oljufýr. Høllin verður upphitað við strálupanelum, og skúlin við radiatorum.







# SKÚLIN Á FLØTUM




**Høvuðsráðgeving:** EIND (SNA/Árni Winther Arkitektar, Brim Arkitektar, Zeta Architects, SMJ og LBF)
**Arkitektaráðgeving:** SNA/Árni Winther Arkitektar, Brim Arkitektar og Zeta Architects
**Berandi konstruktiónir:** LBF | **El-, HVS- og brunaráðgeving:** SMJ | **Akustikkur:** Steingrund Akustik

Skúlin á Fløtum er størsti fólkaskúli í landinum.

Økið er sermerkt í føroyskum høpi. Ein stór, sløtt fløta uttan stórvegis útsýni. Fyri at røkka vakra útsýninum lyftir bygningurin seg upp úr fløtuni. Eitt reint skap við skørpum linjum. Íblásturin er jarðfrøðin, har sterkastu klettarnir standa stinnir, tá alt annað verður máað burturav.

Skúlin er samansettur av sjey oyggjum, ið eru samanbundnar av einum stórum felagsøki. Eins og sjógvurin er bindiliðið og samferðsluæðrin millum føroysku oyggjarnar, skapar felagsvirksemið lívliga sambandið og dagliga renslið millum deildirnar.

Forskúlin og upp til 3. flokk eru niðast í skúlanum, har frítíðarskúli er seinnapartar. Floksstovurnar eru rúmligar við fleiri smáum bólkarúmum. Elstu næmingarnir eru ovast, har tey umframt floksstovur hava egin felagsøki, bólkarúm og vísindadepil við royndarstovum, fyrilestrasali o.ø. Miðdeildin húsast mitt í skúlanum á trimum oyggjum. Brúgvar millum oyggjarnar knýta miðdeildina saman og binda hana saman við hinum deildunum.

Skúlin hevur ítróttarhøll, bókasavn, høli til heilsufrøðingar og stovur til m.a. tónleik, smíð og hondarbeiði.

Bygningurin er ein roynd at sameina byggilist og námsfrøði. Skapið á rúmunum er fjølbroytt við bæði stórum, smáum og høgum rúmum og víðum økjum. Møguleikar eru fyri at nýhugsa frálæruna, samstundis sum floksstovurnar eru siðbundar og rúma vanligum flokkum á 24 næmingar. Tilfarið er í høvuðsheitum glas, betong, gips og timbur. Litirnir eru jørðlitir, sum geva pláss fyri litríkaru børnunum og listini.

Uttandura skapa plantur í hópatali lívd. Lendið norðanfyri er viltvaksandi við gøtum, tjørn og spæliplássi. Sunnanfyri er meira skipað við vøllum, spæliplássum og súkkluparkering. Kring allan skúlan er rennibreyt. Eisini eru karmar gjørdir til at hava partar av undirvísingini uttandura. Úr lendinum er trappa niðan á tekjuna. Har er gongugøta, timburterrassa og frálíkt útsýni.

# FUGLAFJARÐAR SKÚLI




**Høvuðs- og arktiektaráðgevi:** MAP Arkitektar | **Berandi verkfrøði:** LBF
**HVS, kloakk, el og brunaverkfrøði:** SMJ | **Akustikkur:** Steingrund Akustik | **Byggileiðsla:** MAP Arkitektar







Skúlabyggingin er bæði um- og útbygging av verandi skúla. Útbyggingin hýsir barnaskúlanum, sum er grunddeild og miðdeild. Umsitingin í skúlanum og lærarar fáa eisini betri umstøður, og tónleikurin fær betri karmar við fleiri stovum og venjingarhølum. Eisini verður ein nútímans ítróttarhøll bæði til skúlabrúk og til ítróttarlívið í býnum.

Haraftrat hevur nýggi barnaskúlin eina miðhøll, har næmingar kunnu savnast til morgunsang, matarsteðg o.a. Miðhøllin kann eisini brúkast til mentanartiltøk. Skúlin hevur dramarúm, sum samstundis kann brúkast til pall í miðhøllini.

Byggilistin tekur støði í gamla skúlanum frá 1936, sum varð tikin niður í 2018 fyri at geva pláss fyri nýggja barnaskúlanum.

Upprunaliga hevði gamli skúlin eitt torn, sum varð tikið burtur, tá skúlin fekk nýggja yvirtrom miðskeiðis í fimtiárunum. Nýggi barnaskúlin hevur torn, sum er ein umskriving av gamla torninum.

Skúlin hevur ljósar skjøldrar, meðan síðurnar eru klæddar við timbri.

Skúlin í Fuglafirði er staðsettur mitt í býnum, sum ger hann til natúrligan savningardepil. Tað sampakkar eisini við yvirskriftina hjá kommununi fyri skúlabyggingina, sum er “meira enn ein skúli”.

Skúlin liggur stutt frá fótbóltsvøllinum og beint við Skarðsá. Hetta eru natúrlig spæli- og uppihaldspláss fyri størru næmingarnar. Til yngstu næmingarnar er spælipláss á takinum á høllini, sum liggur meira ella minni undir jørð.

Framhaldsdeildin heldur til bygningi, sum varð bygdur upp í gamla skúlan í 1964, og fakhølini eru í einari lon, ið varð tikin í nýtslu í 2004.

Tá nýggi barnaskúlin og ítróttarhøllin standa liðug, er hetta størsta útbygging av Fuglafjarðar skúla nakrantíð.



# Hugsa ljóðið inn beinanvegin

**Við at fáa ljóðviðurskifti inn longu í projekteringini kunnu byggiharrar bæði spara pengar og forða fyri, at vánaligur akustikkur og óljóð er til ampa fyri fólk.**

"Meinar tú virkuliga, at vit skulu klippa fleiri kilometrar av ull og stappa teir í hesar listarnar. Heldur tú, tað ger nakran mun", spyr handverkarin og hyggur sera ivingarsamur upp á Jóhannes Steingrund.

Jóhannes Steingrund flennur, tá hann greiðir frá tilgongdini at tryggja ljóðviðurskiftini í nýggja BankNordik-bygninginum í Havn.

– Eg segði við hann, at eg kundi ikki siga tað við 100% vissu, men at eg var rættiliga vísur í, at hetta var tað rætta.

## Ótráddar gøtur

At tryggja akustikkin í bygningum er ofta at ganga ótráddar gøtur og eisini at koma við loysnum, tá onnur longu hava avgjørt, hvussu bygningurin skal síggja út.

> ESSENSURIN AV VERKFRØÐINI ER AT ROKNA ÚT, HVUSSU TÚ FÆRT SUM MEST BURTURÚR FYRI TEIR PENGAR OG TILFAR, TÚ HEVUR



Tað var eitt puslispæl at finna eina loysn í bankabygninginum. Nógv av tilfarinum uppi undir loftinum er hart tilfar. Tí má okkurt bleytt, ljóðsúgvandi vera uppi undir loftinum fyri at geva rúminum nøktandi akustikk, soleiðis at ljóðið ikki koyrir runt í rúminum og er til ampa fyri starvsfólk og viðskiftafólk.

Í hesum førinum var loysnin at fylla ljóðdempandi ull í teir mongu niðurhongdu listarnar uppi undir loftinum.

Og tað riggaði. Jóhannes Steingrund er sera væl nøgdur við ljóðviðurskiftini í stóra skrivstovulandslagnum í Bank-Nordik-bygninginum.

## Trin og eftirklangur

Jóhannes Steingrund eigur Steingrund Akustik, sum m.a. ráðgevur innan ljóð, bæði tá talan er um nýbygging, umbygging og í serteknískum loysnum. Tað kann snúgva seg um óljóð millum rúm, eftirklangstíð ella trinljóð.

Eisini ger Steingrund Akustik ljóðmátingar og útrokningar í sambandi við óljóð frá virkjum, skipum o.ø. og ráðgevur um, hvussu óljóðið kann minkast. Haraftrat hava tey eisini loysnir innan ljóð, ljós og videotøkni til eitt nú konserthallir, studio, spælihøli og kirkjur.

Jóhannes Steingrund hevur verið í ráðgevaravinnuni í nógv ár og heldur, at byggivinnan og byggiharrar sum heild duga betur at leita sær ráðgeving um akustikk í dag. Seinastu árini hevur hann veitt ráðgeving í fleiri stórum byggiverkætlanum, m.a. Varðin Pelagic, Musikkskúlin, Skúlin á Fløtum, Skúlatrøð og BankNordik.

Uppgávan er sum oftast at tryggja arbeiðsumhvørvið hjá teimum, sum skulu arbeiða og vera í bygninginum. Bæði at tað ikki er ov nógvur larmur millum rúm, og at eftirklangstíðin inni í rúmunum er so stutt sum gjørligt. Eisini at tryggja, at arbeiðsplássið ikki larmar út til grannarnar.

## Varðin Pelagic

Til dømis var hann við frá byrjan, tá Varðin Pelagic á Tvøroyri skuldi byggjast uppaftur eftir stóra eldsbrunan í 2017. Eigararnir vildu tryggja, at nýggi bygningurin ikki var til ampa hjá grannalagnum viðvíkjandi gangi.

Ein spennandi uppgáva sum endaði við eini góðari loysn, heldur Jóhannes



Steingrund, tí tey sluppu at vera við frá byrjan, har tey kundu vegleiða við mátingum, tilfarsvali o.ø.

## Sjúk av ljóði

Ofta eru boð eftir honum at bøta um akustikkin, tá bygningurin langt síðan er bygdur.

Jóhannes Steingrund nevnir dømi um eitt arbeiðspláss við 20 starvsfólkum í sama rúmi, har sjúkrafráveran var sera stór, fólk vóru móð og høvdu høvuðpínu. Tey høvdu kannað ljós, gjóstur, kulda, hita o.s.fr. uttan at finna nakað. So nevndi onkur akustikkin. Tá Jóhannes Steingrund kom inn í rúmið, sá hann beinanvegin trupulleikan.

– Rúmið hevði perforerað gips, men tað var als ikki nóg gott til arbeiðsumhvørvið, mann eigur at hava í einum slíkum høli. So fór eg at kanna, og eftirklangstíðin var alt ov long. Tey skiftu alt loftið út, og tað hjálpti beinanvegin, greiðir Jóhannes Steingrund frá.

## Privacy distance

Í stórum skrivstovulandsløgum skulu atlit takast til nógv annað enn bara eftirklangstíð. Til dømis skalt tú eisini tryggja sonevndu privacy distance, soleiðis at fólk kunnu tosa saman ella í telefon uttan at hini hoyra ella verða órógvað.

Hetta roknar Steingrund Akustik eisini uppá.

Í BankNordik-bygninginum gjørdu tey simuleringar, har tey tóku støði í næstan hvørjum einasta stóli og borði fyri at tryggja so optimal ljóðviðurskifti sum gjørligt.

## Gips og glas

Tilfarið er umráðandi fyri arbeiðsumhvørvið. Sumt tilfar er so hart, at ljóðið verður hvølt og verður ov leingi hangandi í rúminum.

Hvat tilfar orkar ein akustikari sum Jóhannes Steingrund ikki fyri?

-Um tú hugsar um eftirklangstíð og inniumhvørvið á eini skrivstovu, so er tað gisplátur. Tað er tað ringasta, tú kanst koyra upp undir loftið í einum slíkum høli.

Profilbretti úr træ er næstan líka ringt, sigur hann og greiðir frá, at ein gipspláta tekur bara trý prosent av ljóðinum og eitt profilbretti fimm prosent. Vit skulu upp á 90%, um tað skal nytta nakað.

Og so er tað glas...

– Glas er gróthart. Hesi modernaðu fundarhølini í einum skrivstovulandslagi, har allar fýra síðurnar eru úr glasi - har er ikki inniverandi. Tað behøvist mann ikki at rokna uppá, sigur Jóhannes Steingrund.

Eitt glasfundarhøli kann bjargast reint akkustiskt, um bleytt tilfar verður sett upp undir loftið og á í minsta lagi tveir av veggjunum fyri at absorbera ljóðið.

## Best beinanveg

Tað besta er at fáa akustikkin við beinanvegin í projekteringini. Kemur akustikkurin inn seinni, gerst meira avbjóðandi at finna eina góða loysn, tí tá er trupult at broyta tilfar og konstruktiónir.

Ein annar fyrimunur við at leita sær serkøna akustikkráðgeving er at sleppa undan at brúka ov nógvan pening og orku til at ljóðtryggja bygningin. Summi brúka nevniliga ov nógv av ljóðsúgvandi tilfari fyri at tryggja seg.

-Tá brúkar tú óneyðuga nógvar pengar. Essensurin av verkfrøðini er at rokna út, hvussu tú fært sum mest burturúr fyri teir pengar og tilfar, tú hevur. Og tann optimeringin kann gerast, um eg sleppi við, sigur Jóhannes Steingrund.




Arbeiddu mest fyri privatu vinnuna

## Ráðgevaravinnan hevði í fjør 190 milliónir krónur í umsetningi. Hetta er væl meira enn í 2018, tá umsetningurin var 170 mió. krónur. Størsti kundabólkurin var privata vinnan.

Árið í fjør var eitt gott ár hjá føroysku ráðgevaravinnuni. Tøl hjá Ráðgevarafelagnum vísa, at umsetningurin í ráðgevaravinnuni í 2019 var 190 milliónir krónur.

Hetta er ein vøkstur upp á 20 milliónir krónur sammett við 2018, tá umsetningurin í vinnuni var 170 mió. krónur.

Tølini stava frá árligu kanningini, sum Ráðgevarafelagið ger millum limirnar. Felagið spyr ráðgevarafyritøkurnar um virksemi teirra undanfarna ár, m.a. um býtið millum kundabólkar, slag av uppgávum og umsetning.

Í ár svaraðu 76% av fyritøkunum kanningini hjá Ráðgevarafelagnum.

Øll árini síðan 2011 hevur verið ein støðugur vøkstur í umsetninginum hjá ráðgevarafyritøkunum, og árið í fjør var tað besta nakrantíð.

Privata vinnan var størsti kundabólkurin hjá ráðgevarunum í fjør. Parturin hjá tí privata var 38% og hjá kommununum 33%. Almenni parturin stóð fyri 24 prosentum.

Kommunali parturin hevur annars verið størstur hvørt ár síðan 2011. Í 2018 var hann 45%.

Aftur í fjør fevndi mesta arbeiðið – 51 prosent - í ráðgevaravinnuni um bygningar. Hóast hetta er meira enn helmingurin av virkseminum, er hetta tað lægsta síðan 2011. Parturin, sum hevur við anlegg at gera, er hinvegin vaksin. Í fjør var hann 38%, sum er tað mesta nakrantíð.

### Kundasamanseting 2019




### Fakligir faktorar 2019




### Honorarformur 2019



# Hesir limir eru í Ráðgevarafelagnum:

- Arkitektar 99 v/Jóhan Laksafoss
- Brim Arkitektar
- Byggitrygd Sp/f
- Drauschke Consult Føroyar Sp/F
- EYA Arkitektur Design
- Farcon
- FORMO P/F
- Fuglø Arkitektar Spf.
- HMP Consult, ráðg. verkfrøðingar
- Kontrast Sp/f
- KT-Architects
- LBF
- Lon - Byggifrøðilig Ráðgeving
- MAP Arkitektar Sp/f
- Martin E. Leo Sp/f - ráðg. verkfr.
- MP Tek Sp/f
- Ove Mortensen Arkitektavirkið
- Ósbjørn Jacobsen Arkitektar Sp/F
- PB - Consult
- Ráð Sp/F
- Sámal Johannesen
- Selmar Nielsen Arkitektar Spf.
- SMJ Ráðgevandi verkfrøðingar P/F
- Spenn, Sp/F
- Steingrund Akustik Sp/f
- Zeta Architects

RÁÐGEVARAFELAGIÐ